FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ
Føroya Gjaldstova
Traðagøta 39, Postsmoga 2009, FO-165 Argir, Føroyar

# Starv sum KT-leiðari á Føroya Gjaldstovu leyst at søkja

Eitt spennandi og avbjóðandi starv sum KT-leiðari á Føroya Gjaldstovu er leyst at søkja, nú KT-leiðarin ætlar at royna nýggjar avbjóðingar.

Gjaldstovan hevur seinastu árini arbeitt við at nýskipa almenna roknskaparverkið, og hevur tí lagt nógv arbeiði í at taka í nýtslu nýggjar EDV-skipanir, sum eru beinagrindin í búskaparstýring landsins.

Tað er sera umráðandi, at tað arbeiðið, ið er gjørt fyri at náa tað stigið, gjaldstovan er á í dag, kann halda fram í eini natúrligari tilgongd, og krevur hetta eina støðuga menning og viðlíkahald av Búskaparskipanum landsins. EDV-skipanirnar eru lívsæðrin í landsins búskaparstýring, og tí er KT-økið á gjaldstovuni so týdningarmikið.

Í starvinum sum KT-leiðari, hevur ein góðar møguleikar fyri persónligari menning, bæði fakliga og sum leiðari.

**Starvið**
Tú skalt vera leiðari av einari framtakshugaðari KT-deild, har tað í løtuni eru 6 fólk í starvi, við uppgávum sum fevna um gerð av yvirorðnaðum ætlanum fyri KT-økið, menningaruppgávur, ráðgeving og undirvísing á KT-økinum, umframt rakstur av einum fjøltáttaðum landsumfatandi EDV-kervi, ið fevnur um bæði miðsavnaðar og miðfirraðar ambætarar, við arbeiðsstøðum kring alt landið, ið byggir á Unix, Windows NT, Oracle og MS-SQL 7.

**Ábyrgdarøkið**
Starvið sum KT-leiðari er skipað sum deildarleiðarastarv beinleiðis undir stjóranum og er limur í almenna KT-forum sum umboð fyri Fíggjarmálastýrið.

**KT-leiðarin hevur ábyrgdina av:**
- Dagligu leiðsluni og fyrisitingini av EDV-deildini umframt netumsitingini í Fíggjarmálastýrinum.
- At tryggja eina áhaldandi persónliga og fakliga menning av starvsfólkunum á EDV-deildini.
- At orða KT-strategi og virkisætlanir hesum viðvíkjandi
- At menna EDV-trygd og EDV-politikk stovnsins og at góskutryggja KT-økið
- At reka, menna og viðlíkahalda EDV-skipanir stovnsins t.d. Fíggjarstýringarskipan landsins (FSL), ið er grundað á Oracle Applications forritið. Nevnt kann verða, at ætlanir eru um brúk av internetinum til t.d. sjálv-(av)greiðslu.
- At menna og viðlíkahalda EDV-skjalfesting stovnsins, ið fevnir um skjalfesting av EDV-skipanum, tøkniliga bygnaðinum, avtalum við EDV-útvegarar o.t.
- At umsita KT-fíggjarætlan stovnsins, herundir samráðast og gera avtalur við EDV-útvegarar.
- KT-verkætlanum stovnsins, ið umframt projektleiðslu fevnir um kravfesting, undirvísing og innkoyring av nýggjum skipanum. Nevnt kann verða, at ein nýggj felags lønarskipan fyri allar almennar stovnar skal setast í verk í vár.
- Dagliga rakstrinum og umsjónin av tøknliga infrastrukturinum, sum m.a. fevnir um tvær HP9000, HP-UX 11.0 teldur, Windows NT net-ambætarar og umleið 250 teldur.

**Førleiki**
Tann, ið verður settur, skal helst hava hægri útbúgving og drúgvar royndir í beinleiðis arbeiði við fyrisitingarligum skipanum t.d. at hava forritað, gjørt kravfestingar ella hava verið verkætlanarleiðari í tíllíkum arbeiði, sum krevst fyri at umsita nevndu ábyrgdarøki. Tað er ein fyrimunur at hava kunnleika til bókhald og roknskap.

EDV-deildin hevur eisini markamót til nógvar aktørar uttan fyri stovnin, tí er tað so umráðandi, at viðkomandi, ið verður settur, hevur góð samstarvsevnir, fyrisitingarligt hegni og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.
Vit rokna við, at tú hevur hollan kunnleika til KT yvirhøvur, og at tú hevur lætt við at seta teg inn í nýggj amboð innan KT-økið. Tað er avgjørt ein fyrimunur, um tú kennir til Oracle-amboðini, so sum Oracle Browser, Oracle Discoverer og Oracle Report Writer.

**Lønarviðurskifti**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Føroya Landsstýri og viðkomandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við viðmælum og prógvum mugu vera Gjaldstovuni í hendi í seinasta lagi 12. februar 2001 og skulu sendast til:

**Føroya Gjaldstova**
P.O. Boks 2009
FO-165 Argir

Meir fæst at vita um starvið við at venda sær til stjóran, Leif Abrahamsen.

Gjaldstovan stendur fyri inn- og útgjaldingum landskassans og hevur um hendi ein part av almennu lønaravgreiðslunum. Ábyrgdarøkið kann natúrligt liðast sundur í hesar høvuðsuppgávur:
Landsins roknskaparhald - herundir menning, viðlíkahald og rakstur av landsins roknskaparskipan. Gjaldstovan førir í dag bókhald fyri tær flestu høvuðskonturnar á fíggjarlógini og heldur roknskap við ogn og skuld landskassans. Stovnurin umsitur eisini fleiri almenn lán og avgreiðir allar útgjaldingar úr landskassanum og ger landsroknskapin.
Lønarumsiting fevnir um eina menning, viðlíkahald og rakstur av eini miðsavnaðari skipan til útgjalding av almennum lønum. Verkætlanin byrjaði í 1999 og verður fyrsti partur av skipanini tikin í nýtslu til várs. Skipanin verður liðugt innførd 2003.
Á Gjaldstovuni starvast í dag umleið 30 fólk. Stovnurin er skipaður í 4 deildir, sum eru roknskapardeild, lønardeild, fíggjardeild og EDV-deild. Deildarleiðarnir saman við stjóranum eru leiðsla stovnsins.



# Teldukoyrikort í Tórshavn




Nýtt kvøldskeið í teldukoyrikorti byrjar í Tórshavn
**mikudagin 31. januar**
Tekning á telefon 311115

formula.fo



# Teldukoyrikort á Sandi




Nýtt kvøldskeið í teldukoyrikorti byrjar á Sandoyar Meginskúla
**hósdagin 1. februar**
Tekning á telefon 311115

formula.fo



# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16



# Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53



# Bakaralærlingur

Okkum tørvar ein raskan bakaralærling. Hevur hetta tín áhuga, so ring ella skriva til:

frants restorff

Tórsgøta 13
Postsmoga 41
110 Tórshavn
Tlf. 311060






Fáast í tínum klædnahandli
DA FA Tel. 319591






**Knæsokkar fra DIM**
Tann breiði elastikkanturin forðar fyri merkjum á beinunum og ger at sokkurin passar perfekt

Fáast í tínum klædnahandli
DA FA Tel. 319591



# Leder for filetavdelingen

Da vår nåværende avdelingsleder skal over i ny jobb i bedriften søker vi **leder for filetavdelingen.** Avdelingslederen har det daglige ansvar for produkt og produksjonsprosessen i avdelingen. Avdelingen har 90 ansatte og avdelingslederen har det daglige personalansvar. Evne og interesse for å lede og motivere vil derfor bli vektlagt Avdelingslederen inngår i bedriftens ledergruppe og rapporterer til produksjonsleder som har der overordna driftsansvar.

Vi søker først og fremst etter en person som har evne og kunnskap i forhold til å lede porduksjon. Der er en fordel med kjennskap til fiskeindustri, men vi oppfordrer også personer som ikke har bakgrunn fra fiskerinæringen til å søke.

Lønn etter avtale. Vi er behjelpelige med å skaffe bolig. Bedriften har egen pensjonsforsikring.

Kontakt produksjonsleder Øyvind Bolle tlf. 78983431/ 97706861 for nærmere information.

Søknad med CV og attester sendes til Havprodukter AS, pb. B, 9990 BÅTSFJORD innen 11. februar.

**Havprodukter AS** er en del av konsernet Nordic Sea Holding AS. Havprodukter AS er lokaliseret til Båtsfjord i Finnmark, Norge og har 150 ansatte. Vi producerer konsumprodukter og videreforedlede produkter av hvitfisk for eksport. Bedriften er organiseret i 5 avdelinger, brygge, teknisk, filet, ferdigvare og administrasjon



Sosialurin
-tað loysir seg




## VIÐMERKINGAR

# Eingin øsing Jóannes



**Edmund Joensen**

Jóannes Eidesgaard er eftir øllum at døma vorðin firtin av, at undirritaði hevur endurtikið niðurstøðu, sum formenninir fyri teir tríggjar størstu politisku flokkarnar í Føroyum vóru komnir til, og sum Útvarp Føroya hevði valt at seta fokus á.

Yvirskriftin á greinini í Sosialinum leygardagin eitur: »Nú kundi Edmund ikki bara sær longur!«

Høvuðstýdningurin fyri »at **bara** sær«, er sambært orðabókini ein, sum ikki kann halda sær fyri látri.

Fyri okkum í Sambandsflokkinum er loysingin størsta álvarsmálið í føroyskum politikki, og als ikki nakað, sum fær ein at bresta í látur.

Loysingin er álvarslig fyri føroya fólk, og hevur verið tað alla seinastu øldina, og er tað ikki minni í dag. Tað snýr seg um einki minni enn lívsgrundarlagið hjá føroyingum her heima og rættindi føroyinga í ríkis- og altjóðahøpi.

Leiðirnar í politikki hava verið tvær at gingið – Sambandsleiðin ella loysing. Alla tíðina hevur tað verið soleiðis, at Sambandsflokkurin hevur havt greiða støðu fyri ríkisfelagsskapinum, meðan loysingarflokkarnir allir hava staðið hinumegin. Javnaðarflokkurin hevur fyri mesta partin ligið harímillum.

Tað er tó ein sannroynd, at beint eftir seinasta val tók Javnaðarflokkurin undir við loysingarætlanini hjá landsstýrinum, men Jóannes skal hava tøkk fyri, at flokkurin flutti seg nærri sambandsleiðini aftur.

Tað hevur glett okkum í Sambandsflokkinum seinastu tíðina at samstarva við Javnaðarflokkin bæði um tað ríkisrættarliga og tað politiska av øðrum slag á Føroya Løgtingi. Okkara partur fyri at hetta samstarv skal halda fram, skal ikki liggja eftir.

Men tað má standa Sambandsflokkinum frítt at hava eina greiða støðu til henda álvarsama spurning. Tað sigur seg eisini sjálvt, at tað verður ikki Sambandsflokkurin, sum fer at flyta seg yvir ímóti loysingarflokkunum. Sambandsflokkurin vil vera við til eina nýðskipan og nýmótansgerð av viðurskiftunum í ríkisfelagsskapinum. Hetta hevur verið, og er sambandsfloksins politikkur.

At ein viðmerking í bløðunum skal fáa negativt árin á politiska samstarvið ímillum Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin, tað má vera skemt, sum yvirskriftin hjá Jóannesi eisini ber boð um.

Fyri okkum í Sambandsflokkinum er einki broytt viðvíkjandi konstruktivum samarbeiði við Javnaðarflokkin, bæði um tað ríkisrættarliga og annan politikk á Føroya Løgtingi.

Men vit skila okkum sanniliga rætt til at lýsa fyri føroya fólki, munin ímillum Sambandsflokkin og hinar politisku flokkarnar í Føroyum.

# Til økismenningarlandsstýrið

**Svenning Borg**
*Vágur*

Hví skuldi oljufeløgini avgera hvar ið útgerðarhavnin skuldi liggja, men iki hvar oljumálastýrið og MRCC støðin skuldi liggja.

Nú eru útgerðarhavnin, oljumálastýrið og MRCC støðin í meginøkinum, hvat er nú eftir til útjaðaran av oljuvinnuni.

Tað er týðuligt at suðuroyingar eru ein minniluti í Føroyum og verða viðfarnir hareftir, hava ongan rætt til nakað í samfelagnum, sjálvt um ríkidømi er her hjá okkum, so skulu aðrir hava fyrstarætt til tað, hettar er eisini tí, at løgtingsumboðini fyri Suðuroynna eru for vánalig og lata sær alt ov nógv lynda og sær tað út sum um tey bert eru til ífyllu.

Nú setur so Statoil og Co. búsetingarmynstrið í Føroyum út í kortið, hettar er so tað síðsta innan økismenning.

Jú, meginøkið fekk í posa og sekk, leingi livi útjaðarin, leingi livi økismenningin.

## KROSSORÐ




**Vinnari:**
*Finn Bjørn Guttesen*
*Kronhjortl´kken 208*
*DK-5210 Odense NV*

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: PRESENDING

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| P | E | N | I | N | G | A | S | T | O | V | N | U | R | | S |
| FI | S | K | I | G | R | U | N | N | U | R | | S | U | N | I |
| L | | T | | O | A | S | A | | T | Á | M | | S | E | |
| K | M | | C | | S | | R | E | | | O | S | T | U | R |
| A | | F | A | R | A | O | | A | | A | | | A | | Ó |
| | F | Ø | T | | G | A | | | T | N | | M | | | L |
| F | Ø | R | O | Y | A | S | P | A | R | I | K | A | S | S | I |
| I | R | A | | A | R | A | L | | O | R | A | N | | E | G |
| D | O | R | A | | Ð | | I | N | N | | R | A | N | G | A |
| E | Y | | B | A | U | D | | Ó | G | E | R | Ð | | L | |
| L | A | B | B | A | R | | P | A | U | | A | U | E | | J |
| | B | I | | | | O | R | | R | A | | R | | T | U |
| M | A | O | | U | G | G | A | R | | L | A | | H | E | L |
| 257 | N | | F | R | E | N | S | A | G | E | L | D | A | R | I |
| O | K | A | | | V | I | A | | I | N | D | I | A | N | A |

**Hvønn fríggjadag**
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn - og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ...« á bjálvan.

**258**

**Loysunar-orðið:** ..................
Navn: ..................
Bústaður: ..................
Bygd/býur: ..................

***Lesið føroyskt - hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***
- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***
- ❑ **Málllæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar - bæði innan og uttan skúlagátt***